umhvørvisstovan

FKF joun nr: 09-118-1

Føroya Kommunufelag
Frammi í Gerði 1

FO-340 Kvívík

Argir hin 18. oktober 2010
Málsnr.: 10/00631-1
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Jóhanna Olsen

Viðvíkjandi: Hoyring av uppskoti til kunngerð um taðing

Eftir áheitan frá landsstýriskvinnuni hevur Umhvørvisstovan gjørt eitt uppskot til kunngerð um taðing, sum verður sent tykkum til hoyringar.

Uppskotið til kunngerð fatar um nýtslu og goymslu av tøðum, eins og taðing við fiskasúrløgu og slógvi eisini er fevnt av kunngerðini.

Taðing má ikki føra til umhvørvisdálking, heilsuvanda ella ampa í nærumhvørvinum, og taðað skal verða soleiðis, at tøðini verða tikin upp í jørðini. Taðing skal fara fram, tá jørðin er før fyri at taka ímóti tøðunum. Eisini verða krøv sett til støddina á mykjubrunnum, súrhoyggjabrunnum o.t.

Tað er kommunan, sum er myndugleiki, tá tað snýr seg um umhvørvisviðurskifti hjá landbúnaðinum, og verður tað eisini kommunan, ið skal tryggja, at ásetingarnar í kunngerðini um taðing verða fylgdar.

Freistin at koma við viðmerkingum til kunngerðina er 15. november 2010.

Vinarliga

Jóhanna Olsen

Jóhanna Olsen
Deildarleiðari

Hjálagt: Uppskot til kunngerð um taðing

Avrit: Innlendismálaráðið

umhvørvisstovan

Argir hin 18. oktober 2010
Málsnr.: 10/00631-1
Málsviðgeri: Jóhanna Olsen

Uppskot

til

kunngerð um taðing

Við heimild í § 4, stk. 1, § 6, stk. 2, § 7, § 13, § 35, stk. 2, § 35 a, § 37, § 39, § 70 og § 72 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, verður ásett:

Endamál og virkisøki

§ 1. Endamálini við kunngerðini eru hesi:
1) at fremja nýtsluna av tøðum sum tilfeingi,
2) at tryggja at taðing ikki elvir til umhvørvisdálking, heilsuvanda ella ampa í nærumhvørvinum,
3) og at tryggja. at tøð v.m. verða goymd undir tryggum viðurskiftum.

Stk. 2. Við taðing skal skiljast ein útbreiðsla av tøðum, sum jørðin kann taka ímóti.

§ 2. Kunngerðin fevnir um taðing við húsdjóratøðum, súrhoyggjaevju v.m. og goymslu av hesum.
Stk. 2. Kunngerðin fevnir somuleiðis um taðing við fiskasúrløgu ella slógvi.

Allýsingar

§ 3. Í hesi kunngerð skilst við:
1) Ábyrgdarin er festarin, leigarin ella eigarin av jarðarlendinum.
2) Gróðrartíð er frá 15. mai til 1. august.
3) Vatnveitingarlendi merkir lendi har drekkivatn verður savnað, samanber kap. 3 í umhvørvisverndarlógini.
4) Taðingarlendi er lendið har taðingin lógliga kann fara fram, sbrt. § 7.
5) Djóraeind merkir eitt mjólkneyt, av tyngra slagnum uttan viðsetu, sum er inni alt árið. Ella 2,6 viðseta og oksar av tyngra slagnum, í aldrinum 6 til 28 mánaðir, sum eru inni alt árið.

Fyrisiting og eftirlit

§ 4. Kommunan fyrisitur og hevur eftirlit við, at ásetingarnar í hesi kunngerð verða fylgdar. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.

Taðingarætlan

§ 5. Kommunan kann krevja at ábyrgdarin ger eina taðingarætlan, sum lýsir hvar tøðini verða sprænd. Ætlanin skal sendast kommununi til góðkenningar.

Stk. 2. Tíðspunkt, nøgd og hvar taðuð er skal skrásetast. Upplýsingarnar skula latast kommununi eftir umbøn.

Tíðarásetingar

§ 6. Taðast skal í mest møguligan mun í byrjanini av gróðrartíðini.
Stk. 2. Taðing má bert fara fram í tíðarskeiðinum 15. mai til 1. august. Í tíðarskeiðinum 1. apríl til 15. mai og 1. august til 1. oktober kunnu tøð veltast í jørðina.
Stk. 3. Taðing kann bert fara fram gerandisdagar.
Stk. 4. Við støði í taðingarætlanini kann kommunan í serligum førum geva undantøk til taðing í tíðarskeiðnum 1. apríl til 15. mai og 1. august til 1. oktober.
Stk. 5. Frá 1. oktober til 31. mars, báðar dagar íroknað, er bannað at taða.

Avmarkingar

§ 7. Bannað er at taða á vatnveitingarlendum ella í 50 metra fjarstøðu frá vatnveitingarlendum og vatnbrunnum.

§ 8. Loyvt er ikki at taða soleiðis at tøðini seta í áir, løkir, vøtn, tjarnir, á strondina ella á sjógv.
Stk. 2. Loyvt er ikki at taða í regni, tó er loyvt at taða í sirmi.
Stk. 3. Taðing er ikki loyvd tá lendið er fryst ella tá kavi liggur.
Stk. 4. Ikki er loyvt at taða í haga.

§ 9. Í sambandi við spræning av tøðum nærhendis bústøðum, skula atlit takast til ampar av lukti, taðsprutti, o.ø.
Stk. 2. So vítt møguligt skal taðast tá ættin ikki liggur ímóti bústaðarøki og ídnaðarøki.
Stk. 3. Í bý- ella bygdarøkjum er ikki loyvt at taða nærri enn 50 metrar frá bústøðum.
Stk. 4. Um ampar standast av taðingini, kann kommunan geva boð um bøtandi atgerðir. Kommunan kann eisini gera av at banna taðing í ávísum økjum.

Goymslur o.t.

§ 10. Mykjubrunnar, køstar, súrhoyggjabrunnar o.t. skula í minsta lagi rúma tí sum svarar til 10 mánaða framleiðslu av tøðum.

§ 11. Goymslan av tøðum skal staðsetast soleiðis at minst møguligur vandi er fyri dálkingaróhappum.
Stk. 2. Ein tilbúgvingarætlan skal verða knýtt at øllum goymslum av tøðum.

§ 12. Køstar, mykjubrunnar, súrhoyggjabrunnar o.t. skulu verða vatntættir bæði í botninum og í vegginum og hava tætt lok ella annað, sum forðar fyri avdamping og luktampum.

Taðingarlendi

§ 13. Ábyrgdarin skal hava atgongd til nóg mikið av taðingarlendi til at spræna tøðini á. Í minsta lagi 1 ha. av veltari jørð skula verða tøk fyri hvørja djóraeind.
Stk. 2. Um tøð skula spjaðast á økir, sum ábyrgdarin ikki hevur ræðisrættindini á, skal ein skrivlig avtala fyriliggja, áðrenn taðingin fer fram.
Stk. 3. Kommunan kann geva frávik í stødd av taðingarlendi um undirskot er av føðsluevnum í jørðini.

Taðing við fiskasúrløgu ells slógvi

§ 14. Taðing við fiskasúrløgu ella slógvi, krevur góðkenning frá kommununi.

§ 15. Fiskasúrløga ells slógv, íblandað mykjutøð, skal verða væl sundurmalin áðrenn taðað verður. Súrløgan ella slógvið skal blandast við neytamykju í minsta lagi í lutfallinum 1:4. Sprænast mugu í mesta lagi 15 tons av súrløgu ella slógvi pr. ha. árliga.

§ 16. Standast ampar av rottu ella fugli har taðað er við fiskasúrløgu, kann kommunan steðga taðingini.

Gjøld

§ 17. Kommunan kann áseta gjøld fyri góðkenningar og eftirlit eftir hesi kunngerð. Gjøldini mugu ikki vera hægri enn umsitingarkostnaðurin av tænastuni.

Kæra

§ 18. Avgerðir hjá kommununi kunnu, innan 4 vikur frá tí degi avgerðin er fráboðað, kærast til Umhvørvisstovuna.

Revsing

§ 19. Tann, ið brýtur ásetingarnar í §§ 5-15 í hesi kunngerð, ella ikki aktar boð givin við heimild í henni, verður, um ikki strangari revsing er ásett í aðrari lóggávu, revsuður við bót.

Stk. 2. Revsingin kann herðast til fongsul í upp til 1 ár, um brotið er framt við vilja ella av grovum ósketni, og um tað við brotinum er:

1) Voldur skaði á umhvørvið ella elvdur vandi fyri hesum, ella
2) fingin ella ætlaður peningaligur fyrimunur fyri viðkomandi ella onnur, her uppi í við sparing.

Stk. 3. Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitul 5 í revsilógini.

Stk. 4. Fyri brot v.m., sum eru nevnd í stk. 1. er fyrningarfreistin fyri revsiábyrgd 5 ár.

Stk. 5. Málini verða viðgjørd sum løgreglumál. Rættartiltøkini í rættargangslógini kapitli 72 (um at leggja hald á) og kapitli 73 (um rannsókn) eru tó galdandi í sama mun sum í málum, sum verða viðgjørd av statsadvokatinum.

Gildiskoma og skiftisreglur

§ 20. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Ásetingarnar sbrt. § 10 um goymsluviðurskifti, skulu verða fylgdar í seinasta lagi tann 1. januar 2013.

Annika Olsen
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen